# – Vit liva í óvissu her á Kósini



- Eg kann ikki ímynda mær annað, enn at gongd fer aftur at koma á virkið her í Klaksvík, sigur Bergur á Kósini, sum hevur arbeitt her í samfull 31 ár

**Fyri júst eini viku síðani var seinasti arbeiðsdagurin hjá hundraðtals fólkum, sum arbeiddu hjá Maru Seafood á Kósini í Klaksvík. – Her var sera ringur stemningur henda dagin. Eingin segði nakað serligt. Fólk ynsktu faktiskt bara hvørjum øðrum »gleðilig jól«, tí tey væntaðu ikki at fara til arbeiðis aftur hesumegin høgtíðina, sigur eitt av starvsfólkunum, Bergur á Kósini. Hann hevur arbeitt her tey seinastu 31 árini**

FISKAFÓLK
*Snorri Brend*
*Orð&myndir: Snorri Brend*

**Kósin, Klaksvík:** - Nei, tað var ikki so stuttligt at vera til arbeiðis henda fríggjadagin, slær hann fast.

Hesin 46 ára gamli klaksvíkingurin hevur havt mangan góðan arbeiðsdag her á Kósini, síðani hann fyrstu ferð fór til arbeiðis ein dag í mars mánaði 1977.

Tá Sosialurin vitjaði í saltfiskinum á Kósini fyrrapartin í gjár, vóru tey eini 12-15 fólk til arbeiðis. Uppgávan hjá Bergur var at koyra fiskin til og frá arbeiðsborðunum.

Men Bergur hevur tó eisini upplivað tað keðiliga støðuna, tað er at verða sagdur úr starvi. Hetta hendi fyri 16 árum síðani, tá virkið fór av knóranum.

- Hetta var ein øgiliga snedig kensla, skal eg siga tær. Ein kom líkasum bara í eina bíðistøðu, har ein hvørki visti út ella inn, greiðir Bergur á Kósini frá.

Í hesum døgum eru útlitini fyri, at tað sama skal henda einaferð enn rættiliga stór. Men hetta ynskja hvørki hann ella nakar annar í Klaksvík skal henda aftur nú:

- Eg minnist væl, hvussu stórar og óhepnar ringvirkningar hetta hevði á býarlívið. Tað bleiv so sera friðarligt í býnum. Hetta var ein trong tíð hjá mongum hjúnum, men tíbetur reistu vit okkum aftur.

Sjálvur var hann yngri og leysur tá. Í dag er støðan hjá Bergur á Kósini øðrvísi: Hann keypti hús fyri 14 árum síðani. Hann er síðani vorðin giftur við filipinskari kvinnu sum eisini hevur arbeitt á virkinum. Tey eiga eitt barn. Og hann hevur fyri stuttum keypt sær nýggjan bil.

- Ein hevur síni forpliktilsir. Nei, tað má ikki ganga ov leingi, har einki arbeiði er her á virkinum!

### Okkurt má »ske«

Fyrrapartin í gjár var Bergur sum vanligt til arbeiðis á Kósini, saman við øðrum av starvsfelagum sínum.

Tað er týðiligt at merkja, at fólk eru álvarsom, nú líkt er til at grundarlagið undir virkinum er burtur. Tey eru til arbeiðis í dag, men spurningurin er hvussu leingi aftrat:

- Í dag pakka vit saltað longufløk til europeiska meginlandið. Sovítt sum vit vita, verður arbeiði í øllum førum hesa vikuna og kanska nakað út í næstu viku aftrat.

- Spurningurin, sum vit øll her á virkinum seta okkum, er hin einfaldi: - Hvussu leingi aftrat verða vit til arbeiðis her í saltfiskinum?!

Sjálvur roknar hann við at vera til arbeiðis nakrar dagar í komandi viku, men alt er enn í tí óvissa. Tí, sum Bergur sigur:

- Tað verður tosað um at ein loysn er á veg, og at menn her í Klaksvík eru sinnaðir at seta pening í fyritøkuna. Vit vita ikki hvat vit skulu trúgva, tí vit hoyra eisini aðrastaðni frá, at tað eru ikki so positiv útlit kortini.

- Men satt at siga, so ynskja vit bara, at onkur loysn verður sett í verk skjótt, so at alt virksemið ikki steðgar upp. Vit vóna bara, at tað sker okkurt tann rætta vegin beinanvegin, slær Bergur á Kósini fast.

Hann verður avbrotin í samrøðuni við Sosialin, tí boð eru eftir honum: Ein kassi við avfalli skal flytast, og tað er bert hann sum trukkførari, ið kann gera tað.

## Als eingin hjálp úr ALS

**Eins og so mong onnur í Klaksvík er líkt til, at Bergur á Kósini í næstum verður noyddur at venda sær til Arbeiðsloysisskipanina.**

**Hetta dámar honum ikki serliga væl, tí sum hann sigur tað: - ALS er lítið gevandi og veitir okkum lítla hjálp!**

**Tá ein ikki fær fulla viku á einum arbeiðspláss, er tann fyrsti dagurin ella teir fyrstu átta tímarnir fyri egnari ábyrgd.**

**Hinvegin vísir tað seg, at tey fæstu koma uppá 70 kr. um tíman frá ALS, meðan onnur ikki fáa meiri enn góðar 50 krónur í arbeiðsloysisstuðli.**

**- Nei henda skipanin riggar ikki nóg væl!**